**Viðareiðis skúli**
FO-750 Viðareiði
Tlf. 588052 · Teldupostur: vid@skulin.fo

# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Skúlaárið 2006/2007 er eitt tíðaravmarkað starv vegna avlopstímar leyst at søkja.**

Undirvísingartímatalið er umleið 16 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**

- undir ábyrgd leiðslunnar skal taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- er við í arbeiðinum áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær at undirvísa í :**

- føroyskum í 2. og 3. flokki
- ítrótti í 1. og 2. flokki
- næmingi við serligum tørvi

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 4. august kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jensebeth Absalonsen, skúlaleiðara á tlf. 58 80 52.

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*HEIMARØKTIN*

# Røktarstarvsfólk

## til Heimarøktina í Suðurstreymoy

Undir Heimarøktini og Serforsorgini við fyribils tænastu í Heimarøktini Suðurstreymoy sóknast vit eftir starvsfólki við hóskandi røktarfakligari útbúgving at starvast í blandaðum vaktum bæði úti í Heimarøktini og inni á eldrasambýlunum, ið hoyra til økið. Størvini eru leys at søkja frá 1. september 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Talan er um:**

- **1 sjúkrarøktarfrøðing 32 t. um vikuna.**
- **1 sjúkrarøktarfrøðing 32 t um vikuna í avloysarastarvi frá 1. september 2006 til 31. juli 2007**
- Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur 2 ára starvsroyndir innan primera og sekundera heilsustovnin.

**3 heilsuhjálparar 30 t. um vikuna**
Heilsuhjálpari við heilsuhjálparaútbúgving hevur fyrimun. Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur viðkomandi starvsroyndir.

**Løn og setanartreytir**
Lønar – og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Meiri fæst at vita um størvini á telefon 31 72 49

**Umsókn**
Umsóknir saman við prógvi, autorisation og upplýsingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til:

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Att. Økisleiðarin
Skálatrøð 14
FO 100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 14. august 2006 kl. 12**

# Søkt verður eftir starvsfólki

**til Barnagarðin á Svangaskarði, Toftir**

**Til stovuna Sólareyga:**

- 1 námsfrøðingur í tíðaravmarkað starv at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 14. august 2006 til 1. apríl 2007 møguliga longri.

Um eingin námsfrøðingur søkir starvið, verður hjálparfólk sett.

**Vit væntað at umsøkjararnir:**

- Hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Duga at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hava góð samstarvsevnir og kunnu taka ábyrgd
- Eru við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelaagið, pedagogurin í skala frá 10-16 og hjálparfólkini í skala 1-5.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingrid Hansen, leiðara, tlf. 448760 ella 565021.

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 7. august 2006 kl. 12.00.

**Nes kommuna**

**KIOSK ACTIV**

Starvsfólk søkist til dagarbeiði
ca. 40 tímar um vikuna

**Tlf. 233740 ella send umsókn til**
**Kiosk Activ · J. Broncksgøta 44**




Til Cafe A í handilshúsinum Miðlon í havn, sóknast vit eftir fólki at arbeiða fyrrapartar.

Ynskiligt er at viðkomandi er røsk/ur, álítandi og smílandi.

Hevur hetta tín áhuga, hevði tað glett okkum at hoyrt frá tær á tel 221990.

Cafe A

Hoyvíksvegur 67 - 100 Tórshavn - tel 321991

# JT Electric søkir eftir fólki

Í samband við økt virksemi, sóknast vit eftir einum elektrikara ella einum við líknandi útbúgving, til PLC forriting, installering og viðlíkahald av teldukervi og líknandi.

Tað er eitt krav at hava góðan kunnleika til teldur og tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir við PLC forriting og tráðleysum teldukervi.

Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 474444 ella 234444.

**JT electric**
Kambsdalur · Postboks 82
530 Fuglafjørður

# Frá Føroya Psoriasisfelag

Skipað verður fyri viðgerðartúri til Naftalan í Kroatien.

Naftalen er eitt sjúkrahús, ið hevur eina avdeiling sum er fyri fólk við Psoriasis og Psoriasis Artritic.

Farið verður úr Føroyum tann 31. august, og komið verður aftur tann 28. september.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, kunnu fara til egnan kommunulækna, sum sendur umsókn til húðalæknan. Umsóknin skal vera húðalæknanum í hendi seinast tann 14. august.

Eru ivaspurningar hesum viðvíkjandi, kann ringjast á tlf. 424179

**Vinarliga**
**Føroya Psoriasisfelag**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin